gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Gera rundkoyring í Søldarfirði




*Fylt verður upp niðan fyri Krossin, so betri pláss verður fyri nýggju rundkoyringini*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Fyri at bøta um ferðslutrygdina verður rundkoyring gjørd við Krossin í Søldarfirði. Spreingiarbeiðið niðan móti**

**Gøtueiði verður væntandi liðugt í ár**

VEGAGERÐ
*Edvard Joensen*

**Søldarfirði:** Tað verður gjørd rundkoyring á vegamótinum við Krossin í Søldarfirði. Tað fer at bøta munandi um trygdina, verður sagt av Landsverkfrøðingsstovninum.

Teir fylla upp niðan fyri vegin fyri soleiðis at gera pláss fyri sjálvari rundkoyringini. Niðan móti klettinum verður sum er, meðan tað plássið millum vegirnar, har eitt nú busskýlið nú er, verður partur av sjálvari rundkoyringini.

Busskýlið verður flutt, verður sagt frá Landsverkfrøðinginum. Tað skal flytast eitt sindur niðan eftir vegnum móti Gøtueiði og setast upp aftur í niðaru vegsíðu.

Tað fer ivaleyst at lætta mundandi um ferðsluna á Krossinum, tá rundkoyringin kemur, verður sagt frá Landsverkfrøðinginum. Sum er, er keðiligt at koyra har, serliga hjá teimum, sum koma oman av Gøtueiði. Haldast skal av fyri blum báðumegin frá. Umframt at ein keðilig høvd er, sum ger tað heldur ósýnt hjá teimum, sum koma inn eftir úr bygdini í Søldarfirði.

Spreingiarbeiðið niðan móti Gøtueiði skal eftir ætlan verða liðugt í hesum árinum, eins og tilfarið haðani eisini skal vera burturbeint, siga tey hjá Landsverkfrøðinginum. Soleiðis at tann soevndi ráðvegurin er klárur. Men ivaleyt verður ikki klárt at koyra eftir honum enn.

Vegurin oman av Gøtueiði móti Krossinum er heldur brattur, verður sagt, og tí er hann lækkaður nakað væl í niðara parti nakað niðan, áðrenn hann so verður lyftur upp aftur gjøgnum skarðið, sum skotið er í Gøtueiði.

Tað er trongligt at arbeiða á vegastrekkinum millum Krossin og Gøtueiði, láta tey at. Bratt er og ringt at standa, tá skotið er, og gravast skal burtur. Og ferðslan er rættiliga nógv á staðnum.

Hvørja ferð skotið verður, má ferðslan steðgast eina løtu, til grivið er frá aftur. Og tá standa beinan veg einir 50-60 bilar eftir 10 minuttum, siga tey hjá Landsverkførðinginum.

Tað ber heldur ikki til hjá teimum bara at skjóta nær sum helst, ella tá tað liggur best fyri hjá teimum sjálvum. Fyrilit má takast fyri ferðaætlanini hjá Dúgvuni, soleiðis at bilar, sum skulu til Leirvíkar til Dúgvuna, ikki verða steðgaðir og missa túrin orsakað av vegarbeiðinum.

Men eitt hjartasuff hava tey. Og tað er, at tað eru ikki allir bilførarar, sum vísa nóg góðan ferðslusið, tá koyrt verður á staðnum.

Tað er týðuliga merkt, at arbeitt verður á vegnum. Men hóast tað, eru tað veruliga bilførarar, sum bara koyra, sum einki var. Og teir eru »skítfarligir« bæði fyri seg sjálvar og ikki minst arbeiðsfólkið, sum frammanundan hevur torførar umstøður at arbeiða undir.

Og tey leggja dent á, at tað bara eru føroyingar, sum koyra ov skjótt har, hóast rættiliga nógvir útlendskir bilar eisini ferðst tann vegin. Men ikki eina einastu ferða hava tey lagt merki til, at teir koyra ov skjótt ella eru til ampa fyri arbeiðsfólkið.

Annars verður vegarbeiðið, sum gjørt er innanvert fram við eystara armi á Skálafirði, gjørt liðugt eftir summarfrítíðina. Tá verður vegurin undir Valaknúkum endaliga asfalteraður, verður sagt frá Landsverkfrøðingsstovninum.

# Tryggja vatntunnlarnar

**Nýggju vatntunnlarnir hjá elfelagnum SEV norðuri í Eysturoynni verða tryggjaðir nú meðan turra árstíðin er**

VATNORKA
*Edvard Joensen*

Tunnlarnir hjá SEV norðuri í Eysturoynni verða tryggjaðir og reinsaðir, nú meðan turra árstíðin er. Tí verður einki vatn leitt gjøgnum teir í løtuni.

Tað rennur aftur vatn í Vesturdalsá oman Millum Fjarða. Fólk, sum koyra framvið, hava undrast á, hví so er, tí áin varð turkað herfyri, tá vatnið varð tikið og leitt gjøgnum tunnilin í Eiðisvatn, haðani tað fer gjøgnum turbinuna niðri í Barmi.

Onkur hevur gitt, at ov mikið av vatni er, hóast tað skuldi verið ósannlíkt, meðan onkur annar heldur, at kanska er tað av umhvørvisorsøkum, at vatn aftur er komið í ánna.

Men so er ikki, sigur Klæmint Weihe, stjóri á elfelagnum SEV. Hann sigur, at grundin er, at teir hava valt at gera onkrar neyðugar ábøtur í tunnlinum nú, meðan turt er, og lítið vatn rennur burtur.

Hann hevði verið fegnari, um grundin var ovmikið vatn. Men har manglar í. Turt hevur verið í summar, og tað ger, at nógv olja verður brend, sigur hann.

Partar av vatntunnlinum norðanvert í Eysturoynni vóru eitt sindur ivasamir, sigur Klæmint Weihe. Soleiðis, at neyðugt var at festa veggirnar fyri at sleppa undan, at leyst grót seinni fór at detta niður í tunnilin og verða til ampa. So heldur enn at koma aftur um aftur seinni at rudda, verður nú bundið um heilan fingur og tryggjað, árðenn nakað hendir.

Arbeitt verður í summar. Og tvinnar orsøkir eru til tað, sigur SEV stjórin. Tað er lættast at gera tað nú, meðan útgerðin enn er á staðnum. Og so er hendan tíðin tann turrasta á árinum, so tað fer sum minst av vatni til spillis, meðan arbeitt veðrur í tunnlinum.

Arbeiðið við at tryggja og reinsa tunnilin verður væntandi liðugt um ólavsøkuleitið, sigur Klæmint Weihe. Tá verður so turt aftur í Vesturdalsá.

Annars er tunnilsarbeiðið í Norðureysturoynni liðugt, sigur Klæmint Weihe. Feløgini, sum hava borað tunnilin og gjørt inntøkini, eru við at rigga av. Ruddað verður í haganum, har arbeitt hevur verið. Skerv- og grótrúgvur, sum ligið hava eitt nú við munnan oman fyri Funning og við Eiðisvatn, verða beindar burtur.

Við Eiðisvatn hevur verið bummur fyri vegin í longri tíð. Og tað fer tað eisini at verða í framtíðini, sigur SEV stjórin. Orsøkin er, at amboð og onnur útgerð, sum SEV hevur havt standandi á arbeiðsplássinum Suðuri í Dali, ikki fekk frið. Ótangar høvdu fyri at koyra suður haðar um næturnar at gera herverk. Og tí kann SEV ikki liva við, sigur stjórin.

Annars var avtalað, at SEV skuldi syrgja fyri, at gýtingarmøguleikarnir hjá sílastovninum í Eiðisvatni ikki versnaðu, eftir at vatnið varð hækkað orsakað av byrgingunum.

Hetta arbeiðið er ikki gjørt enn, og er grundin tann, sigur Klæmint Weihe, at einki frættist frá avvarðandi hagastýri, sum skal vera við í avgerðini um, hvussu gerast skal. SEV hevur leingi verið til reiðar at gera arbeiðið, men tað skal vera í samráð við hagastýrið. Og haðani er einki rætt, hóast fleiri brøv eru send teimum, sigur SEV stjórin.



*Tað rennur aftur í Vesturdalsá. Men um ólavsøkuna ella so, verður vatnið aftur latið í tunnilin*
*Mynd: Edvard Joensen*

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Mugu standa sum ein maður

**– Tað er ógvuliga óheppið, at vit geva útlendingum fatan av, at ósemja er í Føroyum um, hvussu nógv, vit skulu krevja av samlaðu svartkjaftakvotuni, heldur reiðarin á Christiani í Grótinum og Norðborg**

KVOTUBÝTI
*Áki Bertholdsen*

–Eg haldi ikki, at vit skulu hava minni enn 30%.

Palli Ziska í Klaksvík er ein av okkara fremstu nótamonnum. Og nú tað er greitt, at fiskiskapurin eftir svartkjafti skal skerjast, eftir at fiskifrøðingar hava rópt varskó, er lítið annað væntandi enn eitt hart stríð ímillum tey londini, sum hava rætt til svartkjaftin um, hvussu nógv hvør skal fáa av kvotuni, sum skal fiskast.

Reiðarin úr Klaksvík er ikki fegin fyri at leggja seg út í tað kjakið, ella at geva politikarum góð ráð um, hvat føroyingar eiga at gera, fyri at tryggja okkum okkara part av kvotuni.



*–Eg haldi ikki, at vit eiga at góðtaka at fáa minni enn 30% av samlaðu svartkjaftakvotuni, heldur Palli Ziska í Klaksvík*

–Tað er ein politiskur spurningur. Politikararnir skulu leggja karmarnar og tað haldi eg, at teir skulu gera, so mugu vit rætta okkum eftir tí.

## Ikki minni enn 30%

Kortini heldur hann, at føroyingar eiga ikki at góðtaka at fáa minni enn 30% av samlaðu kvotuni.

–Føroyska útspælið er nú at fáa gott 30% av samlaðu kvotuni og eg haldi avgjørt ikki, at vit eiga at góðtaka at fara niður um 30%.

Hann vísir á, at tá í svartkjafturin er feitur og góður, og tískil er mest verdur, er tá ið hann er undir Føroyum og undir Íslandi.

– Tað eigur at geva okkum góð kort á hondinum.

Hann heldur, at tað er neyðugt at halda fast um sína støðu, tí gongdin er meiri og meiri tann vegin, at hann verður brúktur til matnað.

## Mugu standa saman

Men eitt, sum hann í hvussu so heldur, er, at tað hevur ógvuliga stóran týdning, at føroyingar úteftir standa saman sum ein maður, nú svartkjafturin skal býtast.

–Herfyri kom fram uttanlands, hvussu stór ósemja er í Føroyum um, hvussu svartkjafturin skal býtast og tað er ómetaliga óheppið. Hóast flest øll duga at rokna út, at sjónarmiðini í Føroyum eru ymisk, er tað ómetaliga óheppið, at draga tað kjakið út um landoddarnar og harvið boða hinum londunum frá, at í Føroyum er stór ósemja um málið.

Palli Ziska sigur, at spurningurin um, hvussu føroyingar halda, at svartkjafturin, eigur at verða viðgjørdur innanlendis í Føroyum.

– Og tá ið niðurstøðan so er tikin, eiga vit at standa saman um ein maður úteftir um hesa niðurstøðuna, sig0ur hann.

# Hava havt eitt gott ár

**Tað hevur gingið heilt væl hjá nótabátunum higartil í ár. Bæði Christian í Grótinum og Norðborg hava fiskað fyri góðar 30 milliónir í part**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Tað hevur gingið gott hjá teimum føroysku nótaskipunum í ár. Í hvussu so er hjá teimum í Klaksvík, men gongdin er helst tann sama sum heild.

Palli Ziska í Klaksvík, reiðari á Christiani í Grótinum og Norðborg, sigur, at hjá teimum hevur árið í ár higartil roynst eitt sindur frægari, enn árið í fjør.

–Vit kunnu ikki lata illa at. sigur hann.

Hann sigur, at Christian í Grótinum hevur fiskað 50.000 tons higartil í ár. Hjá Norðborg er eitt sindur øðrvísi. hon fiskar sild nú í summar og har verður fiskurin virkaður umborð, so tað er ringt at gera samanberingar.

Men hann sigur, at teir báðir bátarnir hava fiskað fyri góðar 30 milliónir í part higartil í ár og tað er heldur frægari enn í fjør. Tað er eisini eitt lítið sindur meiri enn teir høvdu væntað frammanundan.

Tó er nøgdin, teir hava fiskað eitt vet minni higartil í ár, samanborið við í fjør, kanska 200 - 300 tons færri, men afturfyri er prísurin heldur frægari.

## Prísurin hækkaður

Palli Ziska sigur, at fíggjarliga úrslitið hjá bátunum í ár er tískil heldur frægari enn teir frammanundan høvdu væntað, at tað fór at vera.

Umframt at avreiðingarvirðið hevur verið heldur betri, hevur oljan eisini verið heldur bíligari, enn teir høvdu væntað.

Annars hava flest øll gramt seg um, hvussu dýr oljan er. Reiðarin heldur eisini, at oljan er rættiliga dýr. Men tá ið teir løgdu fíggjarætlanina fyri í ár, løgdu teir eisini upp fyri, at oljan fór at verða dýr, men hon hevur altso ikki verið so dýr, sum teir høvdu væntað.

Annars lata teir ikki illa at prísinum.

Í fjør fekk Norðborg slakar fýra krónur fyri kilo av sildafløkum. Í ár hevur hon fingið umleið átta krónur, ella tvær ferðir so nógv.



*–Christian í Grótinum hevur fiskað 50.000 tons higartil í ár og prísurin hevur gingið uppeftir. So sum heild er reiðarin vælnøgdur við gongdina*

Svartkjaftaprísurin er eisini nøkunlunda, hóast teir kundu hugsað sær hann eitt sindur hægri.

–Svartkjaftaprísurin hevur gingið eitt sindur uppeftir aftur, men hann er ikki komin nóg høgt upp enn. Higartil í ár hava vit fingið góð 70 oyru fyri og tað er hampiligt.

– Tað vísir seg, at tá ið prísurin liggur á hesum støðinum, er hann javnari, og sveiggini verða ikki so ógvuslig, sum tey hava verið.

Hann minnir á, at í 1998 vóru prísirnir sjáldsama høgir, tí tá táttaði hann í eina krónu fyri kilo. Men so rapaði hann heilt niður á undir 30 oyru aftur.

Nú er hann so komin upp aftur á 70 oyru og har tykist hann nú at hava lagt seg, sigur Palli Ziska.

## Góð inntøka

Tann góða gongdin hjá nótabátunum, sæst sjálvsagt aftur í manningahýrunum. Nú ein dagin visti Sosialurin at siga frá, at tað var ikki óvanligt, at dekkarahýran lá omanfyri 100.000 krónur um mánaðin í ár.

Hetta heldur Palli Ziska vera at gera nakað nógv av. Men hýrurnar eru góðar og teir, sum sigla við nótaskipum, koma at gera tað gott í ár, játtar hann.

Christian í Grótinum avreiðir mest til Havsbrún og hann er ein týðandi partur av rávørugrundarlagnum hjá virkinum í Fuglafirði. Av teimum 50.000 tonsunum, Christian í Grótinum, hevur fiskað, hevur hann avreitt 40.000 tons í Fuglafirði, og tað táttar ivaleyst upp ímóti einum triðingi av tí, sum Havsbrún hevur tikið ímóti higartil í ár.